# Leiðari til útibarnagarð úti í Grøv í Klaksvík

Klaksvíkar kommuna er í ferð við at seta á stovn útibarnagarð úti í Grøv og søkir í hesum sambandi eftir leiðara, við námsfrøðiligari útbúgving.

Talan er um ein kommunalan stovn, har pláss er fyri 40 børnum í aldrinum 3 til 7 ár.

Barnagarðurin er í einum náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt við haga og fjøru.

**Endamálið við stovninum er millum annað:**
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at foreldur ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum.
- At seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum.
- At skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar í einum skapandi umhvørvi.
- At hava gott foreldra og starvsfólkasamstarv.

Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jancy B. Klein tlf. 224474.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skulu vera

**Klaksvíkar kommunu,**
postboks 2, FO-700 Klaksvík,

í hendi í seinasta lagi 30. juni 2002.

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Corolla 1.3
**Árg.:** 1999
**Km:** 40.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 34 57 29
fax nr. 34 56 07
e-mail: hw@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

# Serviceteknikari

Starvið sum serviceteknikari í Útvarpi Føroya er leyst at søkja.

**Starvið:**
Tann, ið verður settur, skal m.a. taka sær av:
- Umvæling og viðlíkahaldi av tekniskari útgerð
- Journalisering av umvælingum
- Nýgerð og tillaging av verandi tøkni
- Uppgávum í sambandi við menning av nýggjari framleiðsluskipan
- Umsiting og viðlíkahaldi av skrásetingarskipan
- Møguligum øðrum uppgávum

**Umsøkjarin skal:**
- Vera útbúgvin radio- ella elektronikkmekanikari
- Hava innlit í ljóðteknikki. Praktiskar royndir á økinum eru ein fyrimunur
- Hava kunnleika til talgilda tøkni (digitalteknikk)
- Kunnleiki til EDV-útgerð er ein fyrimunur
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Kunna arbeiða í skiftandi vaktum
- Vera røkin, fryntligur og hava góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiði við skiftandi uppgávum í einum góðum umhvørvi
- Eitt starv við møguleika fyri støðugari menning
- Skeið uttanlands, har tú lærir um nýggjastu útvarpstøknina

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Umsóknir til starvið skulu vera Útvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. juni.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Andor Johannesen á telefon 316566.

**Útvarp Føroya**
Postboks 328, 110 Tórshavn, tlf. 316566

# Ís sølumaður

fóm

At byrja 1. august ella skjótast gjørligt verður søkt eftir sølumanni til ein av ísbilunum hjá P/F Fóm.

Viðkomandi skal hava tað stóra koyrikorti.

Arbeiðið umfatar at vitja kundar okkara kring um í landinum. Arbeiðið er sjálvstøðugt. Tann vit søkja eftir, skal vera fyrikomandi og samstundis hava hug og áræði at røkka tey úrslit vit søkja.

Skrivlig umsókn verður at senda til P/F Fóm, Boks 308, FO-110 Tórshavn innan 25. juni 2002.

Eru spurningar arbeiðinum viðvíkjandi ber til at ringja til Poul Michelsen á tlf. 314650 ella 212024.

**P/F FÓM**

# Handilslærlingur til Ítróttarhandil

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber. Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðsla, prísmerking/útpakking av vøru, móttøka og avgreiðsla av ordrum.
Tað er eisini møguleiki fyri at næmingurin kemur at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin 3 ferðir 14 dagar á skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, møtir til tíðina, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**P/f Thomas Dam Ítróttur**
Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn

HAVSBRÚN

Søkt verður eftir
# framleiðsluleiðara

*Havsbrún er eitt av størstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 400 mill. kr. árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størri helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til Mjøldeildina. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøli og lýsi, herundir ábyrgd av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

**Vit rokna við at tú hevur:**
- eina holla tekniska útbúgving
- kunnleika til maskinur og teldur
- góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 24. juni 2002. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

**P/F Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 • Fax 414401
E-mail: bep@havsbrun.fo

veitst tú ikki tað?



# Køksveitsla:



**Veitslan verður á Hotel Føroyum fríggjakvøldið 26. juli kl. 19[00]**

Veitslan er fyri syskinabørnum og trímenningum eftir Hans Peturi og Elspu í Køkinum í Norðragøtu við maka.

Seinasta freist at boða frá luttøku er 8. juli, og kann boðast frá hjá einum av niðanfyri standandi persónum:

| | |
|---|---|
| Ingálvur Hansen, Strendur | tlf. 447812 |
| Marvin Hansen, Klaksvík | tlf. 456521 |
| Áslakkur Hansen, Norðragøta | tlf. 441428 |
| Elna Dahl, Klaksvík | tlf. 455507 |
| Jóhannes Hansen, Klaksvík | tlf. 455969 |
| Signbrún Andersen, Klaksvík | tlf. 456062 |
| Henry Jarnskor, Strendur | tlf. 449626 |
| Árant Hansen, Norðragtøta | tlf. 442045 |
| Eli Eiriksson, Norðragøta | tlf. 441211 t-postur: elimar@post.olivant.fo |

Í samband við veitsluna verður ein bóklingur gjørdur um eftirkomararnar hjá Hans Peturi og Elspu í køkinum, og fæst hann til keyps á veitsluni.

HTH stórt 25-ára jubilæum



Drigið verður lut um ferðina til LegoLand fyri 2 vaksin og 2 børn, mánadagin 17. juni kl. 17.00

Høvi verður eisini at heilsa uppá umboð frá HTH úr Danmark

...tú fært tað munandi betri

HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

# Bilfríðkan á bilaframsýning í ítróttarhøllini í Trongisvági

í døgunum 14., 15. & 16. juni







Vit hava nýggjar og sermerktar BMW saman við tí nýggja Fiat Stilo, og brúktar bilar.

Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo